## Betri Stuðul letur gávu til Hjálpargrunn fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn, er grunnur settur á stovn í 1938, við tí endamáli at veita sjófólki, ið eru vorðin óarbeiðsfør av sjúku ella skaða á sjónum, stuðul.

Virksemi grunnsins hevur í øll hesi ár havt alstóran týdning fyri sjófólk og familjur teirra, ið á ein ella annan hátt hava havt henda stuðul fyri neyðini. Stuðulin verður veittur til jóla.

Betri Stuðul hevur í ár valt at lata eina gávu á kr. 50.000 til Hjálpargrunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn.




Birgir Nielsen, formaður fyri Betri Stuðul og Annfinnur Garðalíð, Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Anfinnur Garaðalíð formaður í Føroya Skipara og Navigatørfelag, sum umsitur Hjálpargrunnin, fegnast um at Betri Stuðul í ár hevur valt at veita eina gávu. Hetta kemur sera væl við og gevur okkum enn betri møguleika at veita ein stuðul til sjófólk og familjur, sum hava tørv á slíkum stuðli til jóla.

Birgir Nielsen formaður í Betri Stuðli sigur, at Betri ynskir at ganga á odda, tá talan er um at vísa samfelagsliga ábyrgd og stuðla samfelagsgagnligum virksemi, sum kemur okkara borgarum til góðar og ger okkara lív betri í Føroyum. Endamálið hjá Hjálpargrunninum fyri óarbeiðsførar fiskimenn kemur inn undir okkara endamálsorðing í Betri Stuðli, og tí vilja vit fegin veita ein stuðul á kr. 50.000 í ár, sigur Birgir Nielsen, nevndarformaðurin í Betri Stuðli.

Um tit ynskja meira kunning kunnu tit ringa til Anfinnur í Garðalíð, telefon 216973